## Danir drekka minni

Danir drekka minni brennivín, vín og øl enn fyrr, men teir roykja líka illa enn. Í 2005 drukku danir 10,4 litrar av reinum alkoholi í part, men nú vísa hagtølini, at teir drukku 10 litrar í part í fjør, sigur hagstovan í Keypmannahavn. Hagtølini vísa, at tað er ikki bara brennivínnýtslan, sum er minkað, men at danir eisini drukku eina millión litrar minni av víni og øli í fjør enn árið fyrri. Tað er verri við roykingini. Í fjør roykti hvør dani yvir 14 ár 1.924 sigarettir í part, og tað var tað sama sum í 2005.



## Sigl til G! fyri fimm krónur

Flotti skreytbáturin Pearl siglir millum Tórshavn og Gøtu á G! Festivalinum. Um tú ikki longu hevur keypt atgongumerki til G! og samstundis býr í høvuðsstaðarøkinum, so kanst tú fyri 1200 kr. fáa bæði atgongumerki og ferðing til festivalin. Eitt vanligt atgongumerki kostar 1195 kr., so fyri fimm krónur eyka sleppur tú aftur og fram allar tríggjar dagarnar. Um tú longu hevur atgongumerki, kanst tú verða fluttur aftur og fram fyri 250 kr. Hetta er gott hjá teimum, ið ræðast tunnlar, eru troytt av bussum ella bara vilja njóta ein siglitúr.

# 30-40 mió. fyri nýggja kirkju á Glyvrum



*Nýggja kirkja á Glyvrum verður bygd norðanfyri hesa kirkjuna, sum verður standandi til tann nýggja er liðug*

*Savnsmynd*

**Eftir at avgerð varð tikin um at vraka verandi kirkju á Glyvrum, sum er vorðin ótíðarhóskandi og í minna lagi, og ein útbygging ikki varð mett at vera rætta loysnin, útskrivaði kirkjuráðið á Glyvrum arkitektakapping um nýggja kirkju. Vinnarin er nú funnin**

BYGGING
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Sjálvt um kirkjan á Glyvrum er í minna lagi, er hon ikki ov lítil til vanliga nýtslu. Orsøkin til, at kirkjuráðið fór undir ætlanir at byggja nýggja kirkju er, at verandi kirkja er sera ópraktisk og ótíðarhóskandi. Hetta sigur formaðurin í kirkjuráðnum, Hans Jacob Lamhauge, ið eisini er borgarstjóri í Runavíkar Kommunu.

Kirkjuráðið útskrivaði fyrr í ár arkitektakapping, og 15 uppskot eru komin inn. Vinnarin skuldu almannakunngerast klokkan 14 í Glyvra Skúla, men tað eydnaðist okkum tíverri ikki at fáa navnið á vinnaranum, áðrenn blaðið fór til prentingar.

Hans Jacob Lamhauge vildi ikki út við, hvør hevur vunnið, men sigur, at talan verður um eina ætlan, sum brýtur upp úr nýggjum í føroyskari kirkjubygging.

Enn er ongin kostnaðarmeting gjørd av ætlanini, men kirkjuráðsformaðurin sigur, at kostnaðurin ikki fer undir 30-40 mió. krónur.

15 uppskot komu inn til kappingina, og tey verða øll sýnd fram í fimleikarhøllini í skúlanum, sum Arkitektafelag Føroya skipar fyri saman við kirkjuráðnum.

Saman við fýra kirkjuráðslimum eru tað Gunnar Hoydal og ein norskur arkitektur, sum hava sitið í dómsnevndini og valt vinnarauppskotið út.

Nýggja kirkjan skal byggjast á sama øki sum verandi ella tætt við.

Ætlanin er, at nýggja kirkjan skal gerast ein meira integreraður partur av býarumhvørvinum. Hetta kann gerast við eitt nú einum kirkjutorgi, sum bindur høvuðsvegin og kirkjuna saman.

Kirkjuøkið, ið hoyrir til Glyvra kirkju, umfatar Skipanes, Søldarfjørður, Lamba, Lambareiði, Glyvrar, Saltangará og Runavík.

Samlaða upphæddin til virðislønir og keyp av uppskotum er kr. 300.000. Av hesum verður latin ein 1. virðisløn upp á 150.000 krónur.

# Gott veður á G!



*Aftur í ár verður gott veður á Gøtusandi undir G!*

**Alt týður uppá, at bæði fyrireikarar, tónleikarar og gestir fáa gleða av góðum veðri á G! Veðurmaðurin hjá Sosialinum spáar turt í veðrinum og sólglottar líka til sunnudagin**

VEÐURLÍKINDI
*Kári Mikkelsen*
*karim@sosialurin.fo*

Veðrið undir G! festivalinum í Syðrugøtu var fyri tað mesta gott í fjør, sjálvt um eitt sindur av regni gjørdi seg galdandi, og í ár sær út til at verða uppaftur betri.

Veðurmaðurin, sum hvønn dag skrivar um veðrið á baksíðuni í Sosialinum, Petur Skeel Jacobsen, spáar rættiliga gott veður eftir føroyskum mátistokki.

Í dag og í morgin kunnu gestirnir rokna við turrun veðri við sólglottum, men møguligum mjørkaflókum. Ættin er vestan, og hitin verður 14 til 18 stig.

Leygardagin bjóðar upp á fleyr til gul av ymsum ættum, turt og sólglottar. Hitin verður millum 15 og 18 stig.

Sunnudagin kemur eitt stívt andøvsgul av landnyrðingi, men tað verður eisini turt við sólglottum, og hitin fer at liggja milllum 12 og 16 stig.

Sostatt sær út til, at veðurgudarnir hava gjørt teirra arbeiði, so nú er tað upp til tey tvíbeintu at syrgja fyri, at G! festalurin aftur í ár fer at eydnast væl.



*Veðurgudarnir hjá Petur Skeel Jacobsen, veðurmanni á Sosialinum, lova gestunum á G! gott veður komandi dagarnar*

*Savnsmynd*